# AaB fær Rangers ella Kaunas

Lutakastið til triðja innleiðandi umfar av Champions League var í morgun. Donsku meistararnir úr AaB var í pottinum, og teir skulu hitta annað hvørt skotska Glasgow Rangers ella litavska Kaunas. Annað umfar er framvegis ikki avgreitt, men tað er mest sum vist, at AaB kemur víðari. Teir vunnu fyrra dystin heili 5-0 á Modrica úr Bosnia. Fyrri dysturin millum Glasgow Rangers og Kanuas í Skotlandi endaði málleysur.





eraði á sentrala miðvøllinum, har annars hartarbeiðandi Klæmint Matras ikki altíð slapp sær líka skilagott av við bóltin. Tað gjørdi Hanus Thorleifsson fyri tað mesta, sum eisini spældi á sentrala miðvøllin, men arbeiddi nógv og væl frameftir vøllinum.

Tað gjørdu teir báðir, ið mannaðu vinstru síðu hjá B36 eisini. Alex José dos Santos átti bakkin og Johan V. Gunnarsson vinstra miðvallarborð, og í felag syrgdu hesir at tippa hesa síðuna væl. Bestur av teimum var Santos, sum dugdi at dribla og bjóða av, og átti hann størsta partin av innleggunum, sum komu úr vinstru.

Tað riggaði minni væl í høgru síðu. Ivasamt er, um nakað innlegg kom frá Bergi Midjord, sum kortini skal hava rós fyri at tora at bjóða av, og eisini arbeiða hampiliga væl aftur eftir vøllinum. Tíverri riggaði samstarvið við Magnus Olsen ikki serliga væl. Hesin var óheppin í fleiri førum, millum annað tapti hann eina takling har tað kundi verið heilt vandamikið. Eina aðru ferð stútaði hann bóltin mitt út í brotsteigin har fleiri mótstøðuleikarar vóru, heldur enn at lata bóltin fara út ella stúta hann út í síðuna.

Eisini var tað eitt minni gott avrik frá Meinhardi Joensen. Væl hevði hann fleiri góðar bjargingar, men tápuliga gula kortið, skeiva avgerðin í samband við fyrsta málið hjá Brøndby og eitt ógvuliga óheppið málspark lýta avrik hansara.

Frammanfyri hann var tó besti maðurin á vøllinum. Hesin eitur Dmitrije Jankovic og spældi hann ein branddyst í miðverjuni hjá B36, har hann stýrdi og stríddist betri enn nakar annar leikari.

### Trýstu allan dystin

Men um fleiri vóru góðir hjá B36, so vóru allir mans á liðnum hjá Brøndby enn betri. Og teir góvust ongantíð við at spæla. Teir hildu eina høga leikferð gjøgnum allan dystin, og sluppu ongantíð trýstinum á B36. Tað gav eisini úrslit. Fyrsta málið beint eftir steðgin kom eftir at frísparksinnlegg varð sent innfyri. Eingin útileikari náddi hesum bólti, og tað gjørdi Meinhard Joensen heldur ikki. Hann kom ógvuliga skeivt út og megnaði ikki at beina bóltin burtur, sum tískil endaði har hann ikki skuldi – í málinum. So var samlaða støðan 2-0 til Brøndby og við máli á útivølli skuldi B36 nú skora tríggjar ferðir, um teir teir ynsktu at spæla seg víðari.

Tað megnaðu teir ikki, men móti dystarenda vóru teir rættiliga nær við. Innskifti Ingi Højsted, sum spældi ógvuliga væl ta løtuna, hann var á vøllinum, fangaði bóltin Bergur Midjord misti. Hann sendi Magnus Olsen avstað, ið rak eitt sindur og legði innfyri aftur, har Ingi Højsted tveitti seg fram og var akkurát ov stuttur.

Og løtu seinni var um reppið, at Magnus Olsen javnaði, tá hesin sendi eitt ógvuliga gott fríspark upp í málhorni, men málverjin vardi meistarliga.

### 3 mál er munurin

Men tá føroyingar ikki duga, so duga danir. Í yvirtíðini var galið høgra borðinum hjá B36. Bólturin varð lagdur móti handaru stong, stútaður mitt inn fyri málið aftur, har Samuel Holmén lættliga legði bóltin í tóma netið.

Við hesum var sigurin, og munurin liðanna millum staðfestur. Yvir tveir dystir vann Brøndby við trimum málum móti ongum. Og trý mál er í øllum førum eisini munurin millum oddin í donsku og føroysku deildini. Tískil kunnu teir hvítu úr høvuðsstaðnum vera væl nøgdir við sítt avrik.

## Málskjúttin segði tað var trupult

Samuel Holmén, sum staðfesti sigurin hjá Brøndby, viðgekk, at B36 gjørdi tað trupult hjá teimum.

– Men nú havi eg tað øgiliga gott. Vit vóru favorittar, vístu eisini betra spælið og B36 skapti ikki nógv, hóast teir gjørdu uppgávuna trupla hjá okkum. Men tað var ikki fyrr enn fyrsta málið hjá okkum, at vit fingu tamarhald á dystinum, metti sviin.

Samuel Holmén vísti á, at B36 bara skuldi hava eitt mál, tí so var javnt og neyðugt við umdysti, og tað sat onkursvegna í høvdunum á fleiri av hansara liðfeløgunum.

Nógv hevur verið tosað um, at graslíkisvøllurin var ein fyrimunur hjá B36. Hetta metti Holmén tó ikki eftir dystin. – Nei, tað gekk skjótt fyri seg, so tað var einki at tosa um, segði hann uttan fyri umklæðingarrúmi eftir dystin.

## Málið var ikki heppið

Tað metti Tobias Mikkelsen eftir dystin. – Vit hava vant hava støðuna nógv, og hugskotið aftanfyri er altso, at um eingin okkara fær bóltin, so skal hann enda í netinum kortini. Hatta var væl sparkað, so nei, heppið var tað ikki.

Hann metti heldur ikki, at Brøndby var undir trýsti undan dystinum. – Nei, vit førdu við einum máli, og vistu eisini, at vit nokk skuldu skora eitt aftrat, segði Tobias Mikkelsen í B36 skýlinum eftir dystin.